Fylgiskjal 6

Kommunufelagið

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ
EIRARGARÐUR 2
100 TÓRSHAVN

Dagfesting
19. desember 2025

Okkara j.nr.
25/11092-3

Málsviðgeri
JH

Tygara j.nr.
24/29005

Ummæli av u.t.ll. um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Táverandi Almanna- og mentamálaráðið sendi 21. november 2025 Kommunufelagnum omanfyrinevnda uppskot til ummælis. Felagið hevur viðgjørt uppskotið á borgarstjórafundi 28. november 2025 og hevur hesar viðmerkingar til málið.

Felagið metir ikki, at uppskotið hevur nakra beinleiðis ávirkan á ella týdning fyri kommunurnar, hvørki fíggjarliga ella umsitingarliga. Í tann mun hevur felagið ongar viðmerkingar til ítøkiliga uppskotið.

Tá ið Kommunufelagið kortini velur at senda inn hoyringsskriv, so er tað orsaka av heilt serligu heimildini, sum landið við uppskotinum fær við atliti til at áseta nærri reglur fyri leiguna.

Hesir serligu bráðfeingis bústaðirnir til burturriknar ukrainar verða nevniliga undantiknir leigulógini – grundað á, at talan er um bústaðir av so serligum og fyribils slagi. Í staðin fyri reglurnar í galdandi leigulóg fær Landsverk heimild at áseta leigutreytirnar meira og minni frítt. Til dømis skal Landsverk kunna krevja, at ein leigari skal flyta í eitt annað leigumál, um tað er neyðugt fyri at ein familja kann koma at búgva saman. Slíkt heimilar leigulógin ikki.

Kommunufelagið ger vart við, at kommunurnar hava tørv á einari tilsvarandi heimild á eldraøkinum.

Landsstýrinum kunnugt fara kommunurnar komandi árini at skula leggja enn størri fíggjarliga og umsitingarliga orku í at byggja og umsita ymisk sløg eldrabústøðum. Eitt slag av bústøðum, sum at kalla ikki hava verið royndir í Føroyum áður – hóast heimildin hevur verið í fleiri ár – eru eldrabústaðir til leigu.

Slíkir bústaðar verða í grannalondunum vanliga brúktir sum eitt millumstig millum egið heim og røktarheim. Málbólkurin kann til dømis vera um borgarar, sum eru heldur illa fyri at búgva í egnum heimi, men kortini ov væl fyri til at verða raðfestir til røktarheim. Talan kann eisini vera um hjún, har annar parturin hevur tørv á meiri støðugari røkt, men sum í einum

Kommunufelagið

eldravinarligum bústaði, við rættari hjálp og við einum tættari tilknýti til røktarstarvsfólk, megna tilveruna í egnum leigubústaði nakað longri.

Kommunufelagið hevur fyrr víst á, at ein týðandi orsøk til at kommunurnar ikki hava bygt fleiri av hesum bústøðum er, at útleiga av hesum slagi verður fevnd av leigulógini. Hetta kemst av, at leigulógin sum kunnugt er galdandi fyri alla langtíðarleigu av bústøðum.

Kommunurnar meta tó ikki, at leigulógin hóskandi regulering av kommunalum eldraíbúðum. Ítøkiliga ber nevnliga ikki til hjá kommununi ella eldraøkinum at krevja, at ein borgari skal flyta úr aftur leigumálinum. Hetta er galdandi uttan mun til, um viðkomandi til dømis er vorðin røktarkrevjandi, um tørvurin broytist ella um tað er mest skynsamt at aðrir borgarar flyta inn í júst tað leigumálið.

Kommunurnar halda, at tað eigur at bera til at flyta borgarar í ein annan bústað, tá ið tað er neyðugt ella mest skynsamt fyri tann samlaða raksturin av økinum – sjálvandi treytað av at hóskandi og virðilig atlit verða tikin til tann borgaran, sum skal flyta.

Eins og við bústøðunum til ukrainar, so eru tær eldraíbúðir, sum kommunurnar fara at byggja til leigu, ikki at meta sum vanligir bústaðir, men um serlig tilboð til ávísar borgarar. Kommunalir eldrabústaðir eiga tískil at kunna vera bygdir og raðfestir í einum størri høpi. Kommunurnar mugu í tí sambandi hava møguleika og heimildir at taka meiri yvirskipað atlit til ein skynsaman rakstur av eldraøkinum – til frama fyri øll teirra, sum skulu hava tilboð frá kommununum.

Hesin tørvur hevur leingi verið greiður, men fer at gerast eyðsýndari í árunum, sum koma. Kommunufelagið heitir tí á landsstýrið um skjótast gjørligt at broyta løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., soleiðis at leigulógin verður sett úr gildi fyri teir leigubústaðir, sum kommunurnar við heimild í lógini seta á stovn.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri